## Jokarin í Føroyum

Í sambandi við dystin millum HB og FC Keypmannahavn verður diskotek um kvøldið í Eclipse, har kendi danski rapparin Jokeren fer at undirhalda. Jokeren hevur ligið ovarliga á donskum hitlistum seinastu tíðina við plátuni "Alhpa Han."

Veitslan er fyri øll, tó skal ein tekna seg. Seinasta freist at ogna sær atgongumerkið er týskvøldið kl. 21:00. Atgongumerki kunnu bíleggjast á telefon 254045.

**-hkm**

## Ein gysari

TÍÐINDASKRIV
*Synergi*

Fakfestival 2004 - fyri starvsfólk í frítíðarskúlum og á dagstovnum. Kom og fá eitt boð upp á hvat frítíð er í nútímans samfelagnum - eitt boð upp á frítíðarpedagogisku uppgávuna; eitt boð upp á, um samstarv millum lærarar og pedagogar er ein gysari og mangt mangt annað!

Eftir áheitan frá einum arbeiðsbólki av leiðarum í Frítíðarskúlum í Føroyum, skipar Synergi fyri eini fakfestival fyri starvsfólkum í øllum frítíðarskúlum í Føroyum fríggjadagin tann 13. august í nýmótans hølum á Føroya Sjómansskúla. Endamálið er at skapa fokus á økið og at menna samstarvið millum frítíðarskúlarnar.

Stig G. Lund frá BUPL leggur upp til kjak. Hann er politikari og sálarfrøðingur. Orðstýrari er Óluvá Zachariassen, tíðindakvinna.

**Fleiri evni**
Á skránni er fyrilestur, kjak, pallborð, spurningar, netverk, við meira. Hesi evni verða viðgørd: Hvat er frítíð í nútímans samfelagnum? Spæl, læring og undirvísing. Frítíðarpedagogiska uppgávan. Samskifti. Virðing fyri øðrum og sjálvsvirðing. Uppalararollan - hvørji virði leggja vit í børn okkara? Opið kjak. Samstarv millum lærarar og pedagogar - ein gysari?

**Pallborð**
Pallborðið umfatar visiónir um frítíðarskúlan og aldursbólkin 0-18 ár. Visiónir um samstarv millum lærarar og pedagogar á frítíðarskúlum verður eisini viðgjørt á pallborði.

Málbólkur er øll starvsfólk á frítíðarskúlum í Føroyum - leiðarar, pedagogar og hjálparar. Eisini starvsfólk á dagstovnum, sum arbeiða við "skúlabørnum," eru vælkomin umframt avvarðandi myndugleikar. Seinasta freist at tekna seg er tann 23. juli.

Vilt tú vita meira, kanst tú fara inn á heimasíðuna hjá Synergi www.synergi.fo

## Kvirra oyggin



Sunnudagin tann 4. juli fóru tveir ungir sjónleikarar úr Gøtu til Vestmannaoyggjar í Íslandi. Teir eru við í eini verkætlan, sum er fyri at fáa ung fólk úr Noregi, Íslandi og Føroyum at møtast. Verkætlanin eitur Silent Island.

Fyrsta royndin við verkætlanini var á sumri 2002, tá seks ungir íslendingar vóru í Andøy í Noregi. Í tríggjar dagar skuldu tey klára seg uttan fartelefon, ur, teldu og sjónvarp. Langt vekk frá fólki búðu tey í tveimum gomlum smáttum, sum fiskimenn brúktu fyrr í tíðini. Við hesum skuldu tey fáa íblástur til ymsar framførslur.

Hetta summarið er Ísland karmur um verkætlanina. Tað er bygdin Heimaey í Vestmannaoyggjum, sum er vertur fyri Silent Island í ár.

Gøtumenninir koma aftur til Føroya tann 20. juli. Ferðin er løgd til rættis við hjálp úr Losjuni í Gøtu og Norðurlandahúsinum. Tað ber til at fylgja við verkætlanini á www.silentisland.com

**-hkm**

## Lars-Emil ivast

Lars-Emil Johansen setir spurnartekin við viðferðina av seksualbrotsmonnum í Anstalten við Herstedvester. Hetta ger hann, tí fleiri kunnu sita í nógv ár uttan at verða dømdir egnaðir til at sita í opnum viðgerðarstovni í Grønlandi. Lars-Emil Johansen hevur tískil spurt løgmálaráðharran, hvørji konkret viðgerðartilboð hesi dømdu fáa.

**-hkm**

# Frank og Tommy í Smiðjuni

TÍÐINDASKRIV
*Smiðjan í Lítluvík*

Fríggjadagin tann 16. juli letur upp listaframsýning við Frank Busk og Tommy Láadal Jensen í Smiðjuni í Lítluvík. Ferniseringin verður frá klokkan 17.00 til 20.00.

Frank Busk og Tommy Láadal Jensen eru báðir útbúnir á Det Fynske Kunstakademi í Odense. Teir hava áður arbeitt saman í listarbólkinum "Fourmen", har teir millum annað vóru við í framførsluni "four men box cup 97" á Kulturministeriets framsyningarstað "Overgaden".

Frank er dani, og er hetta fyrstu ferð, hann hevur framsýning í Føroyum. Tommy er uppvaksin í Havn, men býr í Keypmannahavn. Hann hevur fleiri ferðir havt listaframsýningar í Smiðjuni í Lítluvík.

Í framsýningin í Smiðjuni sýna báðir listamenninir fleiri ymiskar og litfagrar óljumálningar fram.

Upplatingartíðir: leygardag og sunnudag frá klokkan 12.00 til 19.00. Mánadag til týsdag frá klokkan 14.00 til 18.00. Framsýningin er frá 16.juli til 21. juli.

# Skopunarslagið

Ein afturvendandi siður, ið hevur ment seg nógv hesi seinnu árini, eru ættarstevnurnar. Í døgunum 17. - 18. juli verður ættarstevna hildin í Skopun. Tað eru eftirkomarar hjá Selatrað-Janus (Jens Joensen, føddur í Skopun 1845, deyður 1924) og Trinu á Koltursmýruni (Anna Katrina S. Samuelsdatter, fødd í Koltri 1841, deyð 1903), ið hava tikið stig til hesa stevnu. Janus og Trina vóru eftirkomarar hjá nøkrum av teimum fyrstu ættarliðunum, ið settu búgv í Skopun.



Tey fyrstu niðursetufólkini komu ymsastaðni frá. Av teimum fyrstu niðursetumonnunum vóru átta úr Koltri og seks av Sandi.

Skráin fyri ættarstevnuna er fjølbroytt við útferðum, bátatúrum og felags tiltøkum. Freistin at melda seg til var tann 5. juli.

**-hkm**

# FCK ræðist ikki veðrið

**Næstu dagarnar heldur danska meistaraliðið til í Føroyum, og FCK skal dystast við tey bæði sigursvandu føroysku feløgini KÍ og HB. Ítróttarstjórin hjá FCK heldur ikki, at veðrið fer at nerva spælararnar hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jonhard Hammer*





*Mynd: Jonhard Hammar*

Føroyingar plaga at fylgja væl við í tí, sum hendir í FC Keypmannahavn. Fremsta orsøkin til tað er, at Todi Jónsson er ein av spælarunum í felagnum, og hann hevur seinnu árini havt stóran týdning fyri úrslitini hjá felagnum.

Nú eru Todi og FCK komin til Føroya, og næstu dagarnar skal danska meistaraliðið venja og spæla dystir her á landi.

Fyrsta uppgávan var mánakvøldið – eftir evstamark her á blaðnum – tá ið FCK spældi í Klaksvík ímóti KÍ, og mikukvøldið verður dystur ímóti HB á Tórsvølli.

**Vandu í Havn**
Mánamorgunin vandi FCK í Havn. Spælararnir komu til landið sunnudagin, og fyrrapartin mánadagin vóru teir til venjingar – ella til arbeiðis – á Tórsvølli.

Nøkur børn vóru komin at hyggja og biðja um autograf frá donsku stjørnunum, men annars var friðarligt, tá ið FCK vandi.

Ein av kendastu spælarunum hjá FCK, suðurafrikanarin Sibusisu Zuma, kom smílandi við einum discmanni til venjing. Hann kemur neyvan á vøllin í Føroyum.

– Eg eri skaddur, so eg fái ikki spælt, men eg ivist ikki í, at Todi fer at spæla, segði Zuma, tá ið hann varð spurdur, um gamla álopsduoin hjá FCK fór at spæla í Føroyum.

– Eg havi ikki sæð so nógv av Føroyum enn, men hetta er eitt fantastiskt land, segði hann.

**Veðrið eingin trupulleiki**
Veðrið, sum donsku spælararnir komu til í Føroyum, var ikki av tí besta. Summarið er næstan ikki til at fáa eygað á, og hitin minnir mest um ein góðan heystdag, men hetta nervaði ikki donsku spælararnar.

– Veðrið hevur ikki verið stórt frægari í Danmark seinastu tíðina, so hetta er ikki so nógv øðrvísi. Men kanska er tað eitt sindur kalt fyri onkrar av spælarunum, segði ítróttarstjórin í FCK, Niels-Christian Holmstrøm.

Størsta stjørnan hjá FCK, í øllum førum um tú spyrt føroyingar, er Todi Jónsson, og hann var eisini við til fyrstu venjingina. Hann var bjartskygdur um dystirnar í Føroyum og roknaði við, at FCK fór at vinna báðar dystirnar.





*– Lat tað vera sagt beinanvegin, at eg trúi ikki 100 % á Grikkaland, men kortini metti eg teir vera sterkari, enn styrkismetingin hjá flestu veddingarfyritøkum. Tú mást minnast, at Grikkaland endaði frammanfyri Spania í undankappingini, og at styrkismeta teir saman við liðum sum Lettlandi og Bulgaria, var ein stór undirmeting, sigur Flóvin av Fløtum Jespersen.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Flóvin er partur av grikska ævintýrinum

**Óvæntaða EM-heitið hjá Grikkalandi gjørdist ein sannur fongur hjá 27 ára gamla havnarmanninum, Flóvin av Fløtum Jespersen. Grikski finalusigurin gav honum 50.000 krónur**

VANN 50.000 KRÓNUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað eru ikki bert grikkar, sum eru á gosi eftir, at Grikkaland sunnukvøldið tryggjaði sær EM-heitið. Hjá 27 ára gamla havnarmanninum, Flóvini av Fløtum Jespersen, fall tað sanniliga eisini í góða jørð, at júst Grikkaland endaði ovast á sigurspallinum í Portugal.

Undan EM-kappingini setti Flóvin 500 krónur á undirmettu grikkarnar at vinna EM-heitið. Veddingin á Grikkaland sum EM-vinnara gav 100 ferðir pengarnar aftur, og málið hjá Angelos Charisteas í øðrum hálvleiki gav Flóvini av Fløtum Jespersen 50.000 krónur í skjáttuna.

**Undirmeting**
Undan EM-kappingini varð Grikkaland mett at vera millum veikastu liðini, og fá góvu grikkunum stórvegis møguleika í kappingini. Spurdur, hvussu tað ber til, at hann valdi at seta pening á undirmettu grikkarnar at vinna kappingina, svarar Flóvin, at tað vóru tvær høvuðsorsøkir til tess.

– Lat tað vera sagt beinanvegin, at eg trúi ikki 100 % á Grikkaland, men kortini metti eg teir vera sterkari, enn styrkismetingin hjá flestu veddingarfyritøkum. Tú mást minnast, at Grikkaland endaði framman fyri Spania í undankappingini, og at styrkismeta teir saman við liðum sum Lettlandi og Bulgaria, var ein stór undirmeting, sigur Flóvin av Fløtum Jespersen.

Hann leggur afturat, at fleiri av hansara vinfólkum stóðu spyrjandi, tá hann fortaldi, at hann hevði sett pengar á Grikkaland, tí tey hildu snøgt sagt, at hann tveitti pengarnar burtur.

– Ein onnur grund til, at eg valdi Grikkaland er, at eitt nýtt rák tykist at vera í fótbóltinum í ár. Fótbóltsárið í ár hevur verið ómetaliga løgið. Í eitt nú Champions League hava sonevndu stóru liðini verið eitt satt vónbrót, meðan smærru liðini standa seg væl. Tað tykist sum um, at tey lið, sum spæla sum ein eind, standa seg best í løtuni. Hyggur tú eisini eftir EM-kappingini, er sama rák galdandi, tí flestu sonevndu favorittarnar við sonevndu stjørnuspælarum fullu tíðliga í kappingini, greiðir Flóvin av Fløtum Jespersen frá.

**Løgið**
Flóvin greiðir frá, at tað hevur verið ein løgin kensla at fylgt Grikkalandi í kappingini.

– Undan fjórðingsfinaluni ímóti Fraklandi, var eg var sannførdur um, at grikkar fóru úr kappingini, men so skuldi ikki vera. Eg var ikki so bangin um dystin hjá teimum ímóti Kekkia, tí Kekkia hevði stórar trupulleikar ímóti Lettlandi, sum eins og Grikkaland spælir definisivan fótbólt.

Spurdur, hvussu hann vil lýsa dagarnar eftir hálvfinalusigurin hjá Grikkalandi ímóti Kekkia, svarar Flóvin, at tað sjálvsagt hevur verið eitt sindur øðrvísi, men hann hevur kortini ikki gjørt stórvegis hóvasták burtur úr sær sjálvum, tí hann væntaði ikki, at tað fór at eydnast grikkum at basa vertstjóðini Portugal sunnukvøldið.

**Uppiborið**
At enda spyrja vit Flóvin um hann heldur, at grikska EM-heitið er uppiborið.

– Ja, tað haldi eg avgjørt. Eg eri fullgreiður yvir, at teir ikki eru mest álopssinnaða liðið, men teir standa ómetaliga væl á vøllinum og spæla væl. Um Grikkaland ikki skuldi vinna, hvør átti so at vunnið?, spyr 27 ára gamli havnarmaðurin at enda.

# Svarið er á veg

**Eigarafelagið í Torkilsgøtu hevur enn ikki frætt nakað frá byggi- og býarnevndini í Tórshavnar býráð um byggingina í Maritugøtu. Nakað síðani sendi eigarafelagið eitt skriv til býrðaðið, har tey mótmæltu nýggju byggingini og hartaðu framferðarháttin hjá býráðnum. Heðin Mortensen formaður í nevndini sigur, at svarið átti at verið á veg.**



BYGGILOYVI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Vit høvdu málið fyri á einum fundi í byggi- og býarnevndini, har alt býráðið var samlað og hurðarnar vóru afturlatnar. Har fingu vit staðfest, at alt er farið regluligt fram. Eg havi fingið tekningarnar fyri økið og har sæst, at upprunaætlaninar eru broyttar, men allar broytingarnar hava verið ígjøgnum tær neyðugu nevndirnar og hava fingið neyðugu loyvini, so tað er alt í lagið, sigur Heðin Mortensen. Hann sigur, at ávísar broytingar hava verið gjørdar, men at tekningarnar tó ikki eru blivnar broyttar sum best hevur borið til. M.a. gjørdi býráðið av at leggja ein barnagarð á økið hjá Guttesen og Staksberg, og tískil fekk byggifelagið eitt annað stykki ístaðin. Nýggja økið, sum teir fingu, er tað, sum liggur beint frammanfyri húsini í Torkilsgøtu, og sum meginparturin av ónøgdseminum hevur staðist av.

– Sjálvandi er tað óheppið, at húsaeigararnir í Torkilsgøtu á fyrstu tekningum síggja, at næsti granni verður 50 metrar frá húsunum, og at tað so brádliga verða bygd hús knappar 20 metrar frá. Men tekningarnar eru broyttar so við og við, og tær hava ligið niðri á býráðnum. Alt er farið regluliga fram og allir býráðslimir hava verið kunnaðir so hvørt, sigur hann.

Spurdur hví býráðið framvegis ikki hevur svarað eigarafelagunum uppá skrivið, tey sendu, svarar hann, at um tey ikki hava fingið svarið enn, so má tað vera á veg.

– Tað tekur eina tíð at avgreiða skivligar spurningar. Men málið hevur sum sagt verið fyri á fundi, tað er viðgjørt, og um svarið ikki longu er farið, so man tað vera á veg, stað festir hann. – Sjálvandi skulu tey hava svar, tað sigur seg sjálvt. Tað skulu øll, sum venda sær til býráðið.

Heðin sigur, at Guttesen og Staksberg hava havt alt sítt uppá tað reina allatíðina. Men teir hava tó ikki fingið endaliga byggiloyvi til triðja byggistig enn. – Tað mangla enn nøkur ting at koma uppá pláss, áðrenn byggiloyvið verður givið til tað, sigru Heðin.

Heðin Mortensen viðgongur, at hetta málið hevur verið sera óheppið, og hann vil geva eigarafelagnum rætt í, at býráðið kanska skuldi gjørt meira við at kunna um broytingarnar. – Hatta mugu vit hava í huga og umhugsa, um so er, at eitt tílíkt mál kemur fyri aftur í framtíðini, sigur hann at enda.